**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

Svimjisamband Føroya bjóðar hervið til

# Aldursbólkameistarastevnu 2022



| | |
|---|---|
| **Dagfesting**: | 14. - 15. mai 2022 |
| **Svimjihøll**: | Klaksvíkar Svimjihøll |
| | 6 x 25m innandura svimjihylur |
| **Adressa**: | Waagsteinsgøta, FO-700 Klaksvík |
| | www.svim.fo |
| **Luttakarar**: | Øll sum hoyra til bólk 1, 2, 3 og 4 hjá SSF |
| | Sí Reglugerð um bólkabýti og Reglugerð fyri Meistarastevnur |
| **Innboðin feløg**: | FLOT, Fuglafjarðar Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, |
| | Reysti, Suðuroyar Svimjifelag, Ægir |

**í samstarvi við**

ATLANTIC AIRWAYS

## Stevnupartar

| | |
|---|---|
| 1. partur: | Leygarmorgun 14. mai frá kl 09:30 - Innleiðandi riðlar |
| 2. partur: | Leygardag 14. mai frá kl 17:00 - Beinleiðis finalur |
| 3. partur: | Sunnumorgun 15. mai frá kl 09:00 - Innleiðandi riðlar |
| 4. partur: | Sunnudag 15. mai frá kl 15:30 - Beinleiðis finalur |

Høllin letur upp til upphiting 1½ tíma áðrenn hvønn stevnupart, sunnudag tó 1 tíma áðrenn

## Tekniskir fundir

Tekniskur fundur fyri dómarar er í svimjihøllini 1 tíma áðrenn hvønn stevnupart

Tekniskur fundur fyri venjarar er í svimjihøllini 1½ tíma áðrenn fyrsta stevnupart

## Kappingarskrá

| | **Dagur 1** | **Dagur 2** |
|---|---|---|
| **Morgun:**<br>Innleiðandi riðlar, ikki bólkað | 01 & 02 - 800 frí B4<br>03 & 04 - 50 bringa B1-4<br>05 & 06 - 200 firvald B3-4<br>07 & 08 - 100 rygg B3-4<br><br>09 & 10 - 200 frí B2-4<br>11 & 12 - 200 blandað B3-4<br>13 & 14 - 100 bringa B2-4<br>15 & 16 - 50 frí B1-4<br><br>17 & 18 - 4x50 frí B1-4 | 19 & 20 - 400 frí B3-4<br>21 & 22 - 200 rygg B3-4<br>23 & 24 - 100 firvald B2-4<br>25 & 26 - 200 bringa B3-4<br><br>27 & 28 - 100 frí B1-4<br>29 & 30 - 400 blandað B3-4<br>31 & 32 - 50 rygg B1-4<br><br>33 & 34 - 4x50 blandað B1-4 |
| **Seinnapart:**<br>Bólkaðar finalur, og beinleiðis finalur har 6 ella færri luttakarar eru tilmeldaðir | 01 & 02 - 800 frí B4<br>03 & 04 - 50 bringa B1-4<br>05 & 06 - 200 firvald B3-4<br>07 & 08 - 100 rygg B2-4<br><br>09 & 10 - 200 frí B2-4<br>11 & 12 - 200 blandað B3-4<br>13 & 14 - 100 bringa B2-4<br>15 & 16 - 50 frí B1-4<br><br>17 & 18 - 4x50 frí B1-4 | 19 & 20 - 400 frí B3-4<br>21 & 22 - 200 rygg B3-4<br>23 & 24 - 100 firvald B2-4<br>25 & 26 - 200 bringa B3-4<br><br>27 & 28 - 100 frí B1-4<br>29 & 30 - 400 blandað B3-4<br>31 & 32 - 50 rygg B1-4<br><br>33 & 34 - 4x50 blandað B1-4 |

Kappingarnar hjá gentum eru ólíka tøl (1, 3, 5, ...) og hjá dreingjum líka tøl (2, 4, 6, ...)

800 frí verður svomið sum beinleiðis finala

## Aldursbólkar

- Bólkur 1: Gentur føddar í 2015 ella seinni, Dreingir føddir í 2014 ella seinni
- Bólkur 2: Gentur føddar í 2013 ella 2014, Dreingir føddir í 2012 ella 2013
- Bólkur 3: Gentur føddar í 2011 ella 2012, Dreingir føddir í 2010 ella 2011
- Bólkur 4: Gentur føddar í 2009 ella 2010, Dreingir føddir í 2008 ella 2009

Bolkarnir kunnu verða savnaðir í sama riðil. Úrslit og heiðursmerki verða bólkabýtt

## Stjórn á stevnuni

Kappingarleiðari er NN or stevnuskrivari NN.
Yvirdómari er NN og startari NN.

## Dómarar

Føroysku feløgini skulu møta við fylgjandi fólki til uppgávurnar sum tíðtakarar, vendidómarar og svimjidómarar: HS, SuSvim og Ægir 5 fólk til hvønn stevnupart; FLOT, FS og Reysti 2 fólk til hvønn stevnupart. Nøvnini skulu sendast til ssf@ssf.fo í seinasta lagi **fríggjadagin 6. mai 2022**.

## Tilmeldingar

Tilmeldingarfíla í Grodan-sniði er løgd á data.tempus.fo. Tilmeldingar skulu gerast og váttast á data.tempus.fo í seinasta lagi **fríggjamorgunin 29. apríl 2022** klokkan 06:00

Hvør felag fær sínar tilmeldingar aftur sum innlisnar í stevnuforritið, dagin eftir at tær eru móttiknar, at kanna og um neyðugt rætta. Seinar tilmeldingar kunnu gerast á data.tempus.fo fram til og við **fríggjamorgunin 6. mai 2022 klokkan 06:00**, tá ið læst verður endaliga fyri tilmeldingum og møguligum útskiftingum.

## Tilmeldingartíðir

Tilmeldingar skulu vera við tíðum svomnar í hesum kappingarárinum, tvs. síðani **1. september 2021**. Um svimjarin ikki hevur nakra tíð, so kann meldast til við ongari tilmeldingartíð.

ATLANTIC AIRWAYS

## Luttøkugjald

Luttøkugjaldið er kr 25 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 100 fyri hvønn start hjá liðsvimjing, fram til og við **hósdagin 28. apríl 2022**; og síðani kr 100 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 400 fyri hvønn start hjá liðsvimjing, fram til og við **fríggjadagin 6. mai 2022**.

SSF ger upp luttøkugjøld fyri svimjarar og liðsvimjingar hjá feløgunum, at gjalda í seinasta lagi **mikudagin 11. mai 2022** til Svimjisamband Føroya á konto 6460 - 151.845.5 í BankNordik.

Um luttøkugjald ikki er goldið tá luttakara listin skal almannakunngerast, verður felagið strikað av luttakaralistanum.

## Frámeldingar

Feløg kunnu frítt melda svimjarar og lið frá, fram til **hósdagin 12. mai** kl 12:00, t.e. dagin fyri stevnu. Feløg kunnu eisini frítt melda svimjarar og lið frá finalu, fram til 30 min. eftir viðkomandi innl. riðlar.

Aftaná hetta, má felagið vísa á serliga, óvæntaða orsøk, um ikki væntandi uppmøting skal geva bót. Hesar orsakir kunnu t.d. vera brádliga íkomin sjúka, skaði, ella persónlig orsøk sum ikki ynskist lýst. Felagið skal lata stevnuleiðsluni hesa frámelding, við grundgeving um orsøk, á skrift í seinasta lagi 30 minuttir aftaná viðkomandi start.

Svimjarar sum á hendan hátt eru frámeldaðir aftaná røttu frámeldingartíð, eiga ikki longur at luttaka á stevnuni, uttan við serligari góðkenning frá stevnuleiðsluni.

Væntandi ella ikki góðtikin frámelding, viðførir bót á 500 kr pr start, eins og luttøka í kapping aftaná væntandi uppmøting altíð vil útloysa bót á 500 kr pr start í øllum tí sum viðkomandi ikki møtti til.

## Klagur

Møguligar klagur skulu stílast til svimjinevnd SSF, við gjald á kr 500.

## Koronareglur

Hendan stevna verður fyriskipað sambært galdandi almennu koronatilmælum, sí [https://korona.fo/tilmaeli?_l=fo](https://korona.fo/tilmaeli?_l=fo)

**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

## Beinleiðis úrslit og sjónvarping

Øll úrslit frá hesum ABMS verða at síggja beinleiðis á www.livetiming.se

Ætlanin er eisini at stroyma frá ABMS á YouTube-rásini hjá SSF

## Samband

Spurningar og viðmerkingar kunnu stílast til ssf@ssf.fo

ATLANTIC AIRWAYS